# Havleikur 2022



Føroyar

12.–17. juli 2022

# Innihald

Havleikur 2022 3
Heimasíða 3
Stevnunevndin 3
Skrá 4
  Fyribils skrá 4
Ferðing 4
  Til Føroya og úr Føroyum 4
    Sjóvegis 4
    Loftvegis 4
  Innanlands flutningur 5
    Vagar (FAE)-Tórshavn 5
    Annar flutningur 5
Samdansir 5
Gisting 5
  Skúlagisting 5
  Onnur gisting 6
    Hilton Garden Inn Faroe Islands 6
    Hotel Brandan 6
    Hotel Føroyar 6
    Hotel Djurhuus (fyrr/tidligere/entinen Hotel Streym) 6
    62°N Hotel City Center (Guesthouse & Hotel) 7
Stevnuhølir 7
  Norðurlandahúsið 7
  Høllin á Hálsi 7
  Eysturskúlin 7
  Vaglið 7
Útferðir 8
  Bygdatúrur í Eysturoynni, 4½ tími, kr. 520 8
  Náttúruvakur túrur við bussi í Vágunum, 4 tímar, kr. 470 8
  Gjógv & pannukøkur, 4½ tími, kr. 447 9
  Vestmannabjørgini, 4 tímar, kr. 560 10
Verkstovur vm 10
  Verkstova í føroyskum dansi 10
  Fyrilestrar 10
  Føroyskt mentanarkvøld 11
Summarlegan 11
Tilmelding 11
  Kostnaðir 11
  Tíðarfreistir 12
  Mannagongd fyri tilmelding 12
Samband 13

# Havleikur 2022

Norðurlendska dansistevnan Havleikur verður í Havn 12. til 17. juli 2022, tó byrjar summarlegan fyri ung í aldrinum 15-25 ár longu 10. juli 2022. Sláið Ring skipar fyri stevnuni í samstarvi við dansifeløgini í Føroyum.

# Heimasíða

Upplýingar um stevnuna verða dagførdar so hvørt á heimasíðuni hjá stevnuni:
https://sr.fo/havleikur-2022/?menuid=5250

# Stevnunevndin

Gunnar Restorff,
formaður – Sláið Ring
sr@sr.fo
tel. +298 292563

Ólavur Lydersen,
Umboð í Nordlek – Sláið Ring
olavur@elektron.fo

Hildur K. Sørensen,
Umboð í Nordlek – Sláið Ring
hildurks@hotmail.com

Andreas Sigurstein,
Lokalur fyriskipari – Tøkum Lætt
ajs@olivant.fo

Birgir Djurhuus,
Lokalur fyriskipari – Dansifelagið í Havn
birgirdjurhuus@gmail.com

Rasmus Joensen,
Fíggjarligur samskipari
rj_stat@olivant.fo

Hendrik Egholm
Fyriskipari fyri Norðurlendsku Summarleguni
jhe@skulin.fo

# Skrá

## *Fyribils* skrá

**10.-11. juli 2022**
Norðurlendsk Summarlega fyri ung byrjar á Sandi. Møguleiki hjá øðrum luttakarum fyri eyka skúlagisting eina ella tvær nætur mótvegis gjaldi.

**12. juli 2022**
Koma til Føroya
Skúlagisting opnar

**13. juli 2022**
Setan
Dansur um kvøldið

**14. juli 2022**
Vitja bygdir og lokal dansifeløg
Dansur um kvøldið

**15. juli 2022**
Fyrilestrar, verkstovur, útferðir
Dansur um kvøldið
Midnáttarguðstænasta

**16. juli 2022**
Dansiframsýningar í býnum
Galladøgurði

**17. juli 2022**
Fráferð úr Føroyum

**18. juli 2022**
Møguleiki fyri eyka skúlagisting eina nátt mótvegis gjaldi, fráferð 18. juli

# Ferðing

## Til Føroya og úr Føroyum

### Sjóvegis

Smyril Line (www.smyrilline.com), M/F Norröna:

- Tórshavn (FO)-Hirtshals (DK)
- Tórshavn (FO)-Seyðisfjörður (IS)

### Loftvegis

Atlantic Airways (www.atlantic.fo):

- Vagar FAE (FO)-Copenhagen CPH (DK),

- Vagar FAE (FO)-Billund BLL (DK),
- Vagar FAE (FO)-Aalborg AAL (DK),
- Vagar FAE (FO)-Oslo OSL (NO),
- Vagar FAE (FO)-Reykjavik KEF (IS),
- Vagar FAE (FO)-Edinburgh EDI (UK)
- Vagar FAE (FO)-London LGW (UK)

SAS (www.sas.com):

- Vagar FAE (FO)-Copenhagen CPH (DK)

Widerøe (www.wideroe.no)

- Vagar FAE (FO)-Bergen BGO (NO)

## Innanlands flutningur

### Vagar (FAE)-Tórshavn

Airport shuttle kann bíleggjast ísv. tilmelding til stevnuna, kr. 175 hvønn vegin (kr. 150 um tað er eitt ferðalag á min. 20 fólk)

### Annar flutningur

Strandfaraskip landsins: ssl.fo

Taxi (Tórshavn): auto.fo

# Samdansir

Samdansirnir verða lagdir út á heimasíðuna, so skjótt sum teir eru tøkir.

# Gisting

Niðanfyri kunnu tit lesa nærri um gistingarmøguleikarnar: á skúlum og á gistingarhúsum.




A Norðurlandahúsið
B Hilton Garden Inn Faroe Islands
C Høllin á Hálsi (Galladøgurði)
D Hotel Brandan
E Eysturskúlin (skúlagisting)
F Hotel Føroyar
G 62°N Hotel City Center
H Hotel Djurhuus

## Skúlagisting

Gisting verður í skúlastovum í Eysturskúlanum. Í skúlanum verður morgunmatur, miðmáli og nátturði. Í skúlanum eru eisini brúsur. Skúlin liggur centralt í Havnini. Skúlagisting er íroknað fulla stevnugjaldið.

Í sambandi við tilmeldingina ber til at leiga ein ‘sovipakka’: luftmadrassu (76 cm x 191 cm x 22 cm), dýnu, kodda, lak og dýnu- og koddaver fyri í alt kr. 500.

# Onnur gisting

Vit hava bílagt nøkur kømur á gistingarhúsum, **bíleggingarnar eru galdandi til 1. januar 2022 (um ikki annað stendur viðmerkt), tá áhugað skulu hava váttað sína bílegging av kømrunum**. Hereftir verða øll kømur frígivin. Tað er bert eitt sera avmarkað tal av kømrum løgd av, og tey, sum bíleggja tey fyrst, fáa tey. Tað er av týdningi, at bílagt verður, sum lýst niðanfyri. Gevið gætur, at gistingarmøguleikar í Tórshavn eru ógvuliga avmarkaðir, og at ofta eru øll kømur upptikin í juli langt áðrenn vit nærkast sumrinum. Gjald fyri gistingarhús verður at avrokna beinleiðis við gistingarhúsið. Ólavur Lydersen samskipar gisting á gistingarhúsunum. Gistingarhúsini, ið tit kunnu lesa nærri um niðanfyri, eru:

- Hilton Garden Inn Faroe Islands
- Hotel Brandan
- Hotel Føroyar
- Hotel Djurhuus (tidligere Hotel Streym)
- 62°N Hotel City Center (Guesthouse & Hotel)

## Hilton Garden Inn Faroe Islands

https://www.hiltongardeninn.fo

Nýtt hotell hjá Hilton ketuni, ið liggur centralt í mund til stevnuvirksemið. Stutt frá Norðurlandahúsinum (1,1 km), Eysturskúlanum (1,2 km), Høllini á Hálsi (0,5 km) og Vaglinum (1,6 km). Prísstøði: tvímans-/dupultkamar úr kr. 1.400 pr. nátt íroknað morgunmat, einmanskamar úr kr. 1.250 pr. nátt íroknað morgunmat. **Bílegging verður framd við at skriva teldupost til barbara@hiltongardeninn.fo og viðmerkja bílegging: GSLR1. Bíleggingin kann fremjast fram til 12. apríl 2022 (so leingi bíløgd kømur eru tøk).**

## Hotel Brandan

www.hotelbrandan.com

Nýtt 4-stjørnað gistingarhús, ið liggur centralt í mun til stevnunuvirksemið. Stutt frá Norðurlandahúsinum (1,1 km), Eysturskúlanum (1,3 km), Høllini á Hálsi (0,3 km) og Vaglinum (1,2 km). Prísstøði: tvímans-/dupultkamar úr kr. 1.250 pr. nátt íroknað morgunmat. **Bílegging verður framd við at skriva teldupost til booking@hotelbrandan.fo og viðmerkja HAVLEIKUR. Freist: 12. oktober 2021 (so leingi bíløgd kømur eru tøk).**

## Hotel Føroyar

hotelforoyar.fo

4-stjørnað gistingarhús, ið liggur nakað burturfrá. Frástøða til Norðurlandahúsið (1,8 km), Eysturskúlan (2,5 km), Høllina á Hálsi (2,3 km) og Vaglið (2,0 km). Prísstøði: tvímans-/dupultkamar úr kr. 1.400 pr. nátt íroknað morgunmat, einmanskamar úr 1.250 pr. nátt íroknað morgunmat. **Bílegging verður framd við at skriva teldupost til hf@hotelforoyar.fo og viðmerkja booking nr. 429404 og HAVLEIKUR. Freist: 1. januar 2022 (so leingi bíløgd kømur eru tøk).**

## Hotel Djurhuus (fyrr/tidligere/entinen Hotel Streym)

http://www.hoteldjurhuus.fo

Gistingarhús tætt við havið og tætt við miðbýin. Frástøða til Norðurlandahúsið (2,5 km), Eysturskúlan (0,8 km), Høllina á Hálsi (2,0 km) og Vaglið (0,7 km). Prísstøði: tvímans-/dupultkamar úr kr. 1.100 pr. nátt íroknað morgunmat, einmanskamar úr kr. 1.000 pr. nátt íroknað morgunmat. **Bílegging verður framd við at skriva teldupost til liv@hd.fo og viðmerkja HAVLEIKUR. Freist: 1. januar 2022 (so leingi bíløgd kømur eru tøk).**

### 62°N Hotel City Center (Guesthouse & Hotel)

www.62n.fo

Eitt eldri guesthouse og nýtt 3-stjørnað gistingarhús, ið liggur í miðbýnum í Tórshavn. Frástøða til Norðurlandahúsið (1,7 km), Eysturskúlan (1,0 km), Høllina á Hálsi (1,4 km) og Vaglið (0,3 km).

**Guesthouse**, prísstøði:

- tvímans-/dupultkamar: kr. 845 pr. nátt íroknað morgunmat
- einmanskamar: kr. 645 pr. nátt íroknað morgunmat
- tvímans-/dupultkamar uttan WC: kr. 650 pr. nátt íroknað morgunmat
- trímanskamar: kr. 1.145 pr. nátt íroknað morgunmat
- fýramanskamar: kr. 1.400 pr. nátt íroknað morgunmat

**Hotel**, prísstøði:

- tvímans-/dupultkamar: kr. 1.495 pr. nátt íroknað morgunmat
- superior við balkon: kr. 2.295 pr. nátt íroknað morgunmat
- suita við balkon: kr. 2.295 pr. nátt íroknað morgunmat

**Bílegging frá 62°N HOTEL city center (bæði guesthouse og hotel) verður framd við at skriva teldupost til susanna@62n.fo og viðmerkja booking 4069419 HAVLEIKUR. Freist: 1. januar 2022 (so leingi bíløgd kømur eru tøk).**

# Stevnuhølir

## Norðurlandahúsið

www.nlh.fo

Dansur um kvøldið, føroyskt mentanarkvøld, fyrilestrar



*Norðurlandahúsið - © Marita Gulklett*

## Høllin á Hálsi

Galladøgurði, setan (um veðrið er vánaligt)

## Eysturskúlin

Skúlagisting, stevnumáltíðir, verkstova í føroyskum dansi

## Vaglið

Setan (um veðrið er til vildar)

# Útferðir

Fríggjadagurin 15. juli 2022 hava stevnuluttakararnir møguleika at keypa 1) útferðir, 2) luttøku á verkstovu í føroyskum dansi, 3) luttøku í fyrilestrum, og/ella 4) luttøku í Føroyakvøldi. Útferðirnar, verkstovan, fyrilestrarnir og føroyskt mentanarkvøld verða keypt og bíløgd í samband við tilmeldingina. Niðanfyri sæst, hvørjar útferðir eru at velja ímillum. Ynskir eitt ferðalag eina útferð áðrenn stevnan byrjar, kunnu tey t.d. seta seg í samband við Mouritsen's Bussar, tlf. +298 322121, teldupost: mb@mb.fo.

## Bygdatúrur í Eysturoynni, 4½ tími, kr. 520

Vit fara úr Havnini og koyra gjøgnum nýggja undirsjóvartunnilin millum Streymoy og Eysturoy. Hesin 11 km langi tunnilin hevur eina vakurt prýdda rundkoyring undir havbotninum. Fyrsta vitjanin er í einum seyðahúsi, har bóndin fer at siga frá um seyðahald, og tú sleppur heilt nær at síggja seyðin. Tú fært eisini eina smakkroynd av turrum føroyskum kjøti og okkurt leskiligt við rabarbum frá staðnum, vit vitja. Aftaná vitjanina sleppur tú at síggja, hvussu ullin verður brúkt á føroyska virkinum Navia, ið framleiðir klæði úr ull og sameinir nútíðar sniðgeving við aldargamlar skikkir og siðir, og gevur hetta hvørjum einstøkum klædnaplaggi sítt egna sereyðkenni av bestu góðsku. Úrslitið er uttan maka, bæði sum plagg av bestu góðsku og sum serstakt frítíðarplagg.

Tá vit koma longur norður, vitja vit bygdina Gøtu, har savnið Blásastova gevur okkum eitt heilt serstakt innlit í mentanina og liviháttin í Føroyum í farnu øldum. Her sært tú eitt fullfíggjað, gamalt føroyskt bygdasamfelag við gomlum bóndahúsum, smáttum hjá útróðrarmonnum og eini gamlari kirkju.




*Norðragøta - © Marita Gulklett*

Ávegis til Havnar koma vit fram við friðsælum bygdum og fara um 'einastu brúnna tvørtur um Atlantshavið', ið bindur Streymoynna saman við Eysturoynni. Vit fara eftir oyggjarvegnum og støðga á, har frálíkt útsýni er yvir Havnina.

## Náttúruvakur túrur við bussi í Vágunum, 4 tímar, kr. 470

Njót ein náttúruvakran busstúr í teimum hugnaligu, siðbundnu bygdunum í teirri vøkru Vágoynni.

Far norðureftir úr Havnini og gjøgnum ein undirsjóvartunnil til náttúruvøkru oynna Vágarnar. Í Vágum eru tríggjar stórar bygdir, Miðvágur, Sandavágur og Sørvágur, og tríggjar lítlar bygdir, Bøur, Gásadalur og Vatnsoyrar. Gloym teg heilt burtur í mentanini og náttúruni, meðan tú vitjar nakrar av hesum bygdunum.

Fyrsti steðgurin er í Sandavági, ein vælhildin, søgulig bygd, har útgrevstur hevur avdúkað toftir úr miðøld. Vitja serstøku Sandavágs kirkju við teirri eyðkendu reyðu tekjuni, har Sandavágssteinurin, ið er rúnarsteinur við innskrift frá 13. øld, er sýndur fram. Aftaná heldur vakri busstúrurin fram, og fert tú framvið Sørvági og Vatnsoyrum, eini niðursetubygd frá 1921. Vatnsoyrar er einasta bygd í Føroyum, sum ikki liggur út til sjógvin, men harafturímóti út til stóra vatnið Sørvágsvatn.

Síðani kemur tú beinan vegin til Bíggjar, ein aldargomul bygd, sum verður mett at vera ein av elstu bygdum í Føroyum; útsýnið út í hav er eitt hitt vakrasta í Føroyum. Vit fáa eitthvørt leskiligt og heimabakaða køku í tí gamla pakkhúsinum frá 1861.

Tú kanst velja at fara við ferðaleiðaranum til gongu runt í Bø. Gerst hugtikin av stórmæta útsýninum út í hav og av Tindhólmi við sínum nógvu tindum. Í bygdini eru gomul timburhús og ein siðbundin, gomul svarttjørað kirkja frá 1865. Síðsti steðgur er í Gásadali, ið er ein fjarstødd bygd, har færri enn 20 fólk búgva. Bygdin liggur út til Mykinesfjørð, og mugu vit koyra gjøgnum eitt berghol fyri at koma hagar.



*»Múlafossur«, Gásadalur - © Marita Gulklett*

## Gjógv & pannukøkur, 4½ tími, kr. 447

Njót, hvussu bergtakandi vakrar Føroyar eru, áðrenn tú gert ein støðg í eini náttúruvakrari útróðrarbygd fyri at royna tær sera góðu pannukøkurnar har.

Far ein náttúruvakran busstúr norðureftir fram við friðsælum bygdum og teirri gomlu hvalastøðini við Áir, áðrenn tú fert um 'einastu brúnna tvørtur um Atlantshavið' inn í Eysturoynna – næststørsta oyggj í Føroyum. Far framvið bygdini Eiði og síggj drangarnar, Risan og Kellingina, ið standa upp úr havinum, áðrenn tú fert fram við Slættaratindi, ið er hægsta fjall í Føroyum, og heldur leiðina víðari til Gjáar.

Gjógv, ið ber navn eftir teirri 200 metur longu gjónni, sum hevur eina útrúliga, náttúrliga havn, har útróðrarbátar kunnu fáa lívd av landi. Njót siðbundnu pannukøkurnar, ið verða borðreiddar við kaffi og te á gistingarhúsinum í bygdini. Síðani kanst tú seta teg upp afturá og hvíla teg inni í hitanum, ella fara ein gongutúr gjøgnum ta lítlu vøkru útróðrarbygdina og hyggja at hugtakandi gjónni.



*Gjógv - © Marita Gulklett*

Tá tú fert heimaftur eftir oyggjarvegnum til Havnar, støðgar tú, har tú hevur útsýni yvir Havnina og har kanst tú taka nakrar vakrar myndir av Havnini og náttúruni kring hana.

## Vestmannabjørgini, 4 tímar, kr. 560

Vit fara við bussi til Vestmannar, haðani vit fara við bátum út til fuglabjørgini. Her er nakað fyri allar sansirnar: ljóðið av sjófugli, tutlið frá sjónum og tess skiftandi litir, veðurbarda landslagið og himinin, ið nertir tindarnar á fjøllunum. Vit sigla framvið bergi í báðum borðum og fara inn í eina smala gjógv, har blanka bergið í báðum borðum rísir steyrrætt móti himni. Í erva í bjørgunum nærindis hiimininum gongur seyður heilt óávirkaður á biti. Báturin fer spakuliga inn í eina av teimum mongu holunum, og brádliga hvørvur alt dagsljós eina løtu. Myrkur og ljóðið av dropum úr loftinum sígur um okkum, og brádliga eru vit úti aftur í hinum endanum. Vit leggja stilt eina løtu og njóta landslagið. Fólk peika og taka myndir, men ein mynd fær als ikki endurgivið tað, sum tú sært. Tað kann bert hjálpa tær at minnast aftur á staklutirnar. Aftaná fara vit aftur til Havnar eftir oyggjarvegnum og støðga, har útsýni er yvir alla Havnina.



*Saksunardrangur, Vestmannabjørgini - Erik Christensen,* [CC BY-SA 3.0](CC BY-SA 3.0)

# Verkstovur vm

Á stevnuni er ymiskt virksemi fríggjadagin, ið til ber at melda seg til: verkstova í føroyskum dansi, fyrilestrar um ymisk evni, føroyskt mentanarkvøld. Lesið nærri um hvørt av tiltøkunum niðanfyri.

## Verkstova í føroyskum dansi

Skeið verður hildið í føroyska dansinum, sum hevur yvirlivað síðani miðalaldurin. Luttakararnir verða undirvístir í:

- at dansa, bæði føroyskan ringdans og ymisk dansispøl
- søgu og siðvenju hjá dansinum

Skeiðshaldari er Petur Olivar í Hoyvík. Skeiðið í føroyskum dansi verður í Eysturskúlanum fríggjadagin 15. juli 2022 kl. 10:00-12:00. Tilmelding fer fram ísv. sjálva tilmeldingina til stevnuna. Kostnaður: kr. 50.

## Fyrilestrar

TBA

## Føroyskt mentanarkvøld

Ein stutt ferð gjøgnum føroyska mentan, har vit uppliva søgu, yrkingar, tónleik og sang. Vit fáa eisini smakkiroyndir av tí serstaka føroyska matinum, og afturvið verður ein góð føroysk øl at njóta og eisini snapsur til teirra, sum hava hug til tess. Harumframt verður føroyskur dansur, har øll fáa høvi at luttaka. Meldað verður til føroyskt mentanarkvøld ísv. tilmeldingina til stevnuna. Tiltakið verður í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið 15. juli 2022 kl. 20:00-21:30. Kostnaður kr. 125 pr. persón.

# Summarlegan



*Sandur, Sandoy - © Marita Gulklett*

Í sambandi við Havleik verður skipað fyri Norðurlendskari Summarlegu fyri ungdómum í aldrinum 15 til 25 ár. Pláss er fyri 50 ungum á legunum. Hesi ungu møtast á Sandi sunnudag seinnapart ella sunnukvøldið 10. juli 2022. Luttakarar fáa nátturða sunnukvøldið og so verður dansað um kvøldið. Ymsar útferðir verða, ætlandi til Dals og Skúvoyar, og ymsar verkstovur, hugni og sjálvandi verður dansað. Farið verður til Havnar um morgunin/dagin 13. juli 2022, har stevnan Havleikur verður sett um kvøldið. Kostnaður fyri at luttaka á Norðurlendsku Summarleguni er kr. 500 pr. persón (umframt vanliga stevnugjaldið fyri Havleik). Íroknað er gisting, matur, útferðir v.m. á summarleguni.

# Tilmelding

Niðanfyri eru upplýsingarnar, ið viðvíkja tilmelding til stevnuna; herímillum eru upplýsingar um stevnugjald, kostnaður fyri ymiskt virksemi v.m., tíðarfreistir umframt mannagongd fyri tilmelding.

## Kostnaðir

Til stevnuna »Havleikur 2022« kostnaðirnir hesir:

- **Vanliga stevnugjaldið er kr. 2.600** – íroknað er luttøka í stevnuni, vitjan hjá lokalum dansifeløgum hósdag, galladøgurði leygarkvøld umframt matur og skúlagisting frá og við nátturða týskvøldið 12. juli til og við morgunmat sunnumorgun 17. juli.
- **Niðursetta stevnugjaldið er kr. 1.600** – íroknað er luttøka í stevnuni, vitjan hjá lokalum dansifeløgum hósdag umframt galladøgurði leygarkvøld. Matur og skúlagisting annars er ikki við í hesum prísi.
- **Sovipakki ísv. skúlagisting kostar kr. 500** – íroknað er ein luftmadrassa (76 cm x 191 cm x 22 cm), dýna, koddi, lak, dýnu- og koddaver.
- **Hvør eyka gisting í skúla kostar kr. 125** – møguleiki er fyri eyka gisting á skúla við komu í fyrsta lagi 10. juli og við fráferð í seinasta lagi 18. juli.

- **Eyka máltíðir** frá nátturða 10. juli til morgunmat 18. juli – gev gætur, at máltíðirnar frá nátturða 12. juli til og við morgunmat 17. juli eru við í fulla stevnugjaldinum, men ikki í tí niðursetta stevnugjaldinum. Kostnaður fyri eyka máltíðir eru hesar:
  - **eyka morgunmatur kr. 80,**
  - **eyka miðmáli kr. 85,**
  - **eyka nátturði (heitur 'døgurði') kr. 90.**
- **T-skjúrtur við Havleik búmerki kosta kr. 125 hvør** og fáast í støddunum S, M, L, XL umframt XXL.
- **Føroyskur dansur fredag fyrrapart kostar kr. 50**.
- **Fyrilestrarnir fríggjadag seinnapart kosta kr. 100.**
- **Føroysk mentanarnátt í Norðurlandahúsinum fríggjakvøld kostar kr. 125.**
- **Fýra ymsar útferðir fríggjadagin:**
  - Bygdatúrur í Eysturoynni, kr. 520
  - Náttúruvakur túrur við bussi í Vágunum, kr. 470
  - Gjógv & pannukøkur, kr. 447
  - Vestmannabjørgini, kr. 560
- **Summarlegan fyri ung í aldrinum 15-25 ár kostar kr. 500.**
- **Airport shuttle millum flogvøllin og Tórshavn kostar kr. 175 hvønn vegin** (kr. 150 um talan er um minst 20 fólk ferðast saman í bólki)

## Tíðarfreistir

Í samband við tilmelding til stevnuna er hesar tíðarfreistir:

- **1. november 2021**: Tilmeldingin letur upp – londini hava fingið tillutað kvotur, og leiðslan fyri fólkadansi/Nordlek umboðið í hvørjum einstøkum landi samskipar, hvussu nógv hvørt felag/bólkur kann melda til.
- **15. januar 2022**: Síðsta freist hjá einstøku londunum at melda til innan kvoturnar, ið tey hava fingið tillutað – tá henda freistin er farin, verða ikki nýtt pláss frígivin so onnur long kunnu brúka hesi.
- **15. apríl 2022**: Síðsta freist at melda seg til stevnuna & síðsta freist at gjalda stevnugjaldið og annað, ið er bílagt í samband við tilmeldingina. Verður avlýst áðrenn 15. mai 2022, verður helvtin av tí goldna endurrindað; verður avlýst eftir 15. mai 2022, verður einki endurrindað.

Skuldi tað aftur komið avmarkingar fyri ferðing millum norðurlendsk long vegna koronusmittuna, nýggjar karantenureglur og/ella bann fyri at savnast í størri bólkum ella at dansa, so verða treytirnar tillagaðar samsvarandi áðrenn 15. apríl 2022.

## Mannagongd fyri tilmelding

Leiðslan fyri fólkadansi ella nordlekumboðini í hvørjum einstøkum landi samskipa tilmeldingina – herímillum avtala hesi við einstøku feløgini/bólkarnar, hvussu nógvar luttakarar hvørt felag/bólkur kan melda til. Hvørt einstakt felag/bólkur savnar inn upplýsingar um tey, sum luttaka, t.v.s. grundupplýsingar um luttakararnar, koma og fráferð, slag av stevnuluttøku (við ella uttan mat og skúlagisting), møguligar aðrar bíleggingar ísv. tilmeldingina v.m., og melda bólkin til í seinasta lagi 15. januar 2022 samlað í einum rokniarki, ið verður útflýggjað av fyriskiparunum til sama endamál. Hetta rokniark verður tøkt í seinasta lagi 1. november 2021. Harumframt verður eitt tilmeldingarskjal tøkt, sum felagið/bólkurin kann nýta, tá tilmeldingarnar frá einstøku luttakarunum verða savnaðar inn.

# Samband

Hava tit spurningar í samband við Havleik 2022, eru tit vælkomin til at seta tykkum í samband við okkum við at senda okkum ein mail til sr@sr.fo